# Stórur áhugi fyri ídnaðarøkinum

**Klaksvíkar býráð hevur fleiri umsóknir frá fyritøkum, sum vilja byggja á ídnaðarøkinum á Borðoyarvík. Býráðið fer í næstum at gera av, hvat skal gerast á hesum økinum**

ÍDNAÐUR
*Stefan í Skorini*

**KLAKSVÍK:** Uppi við Borðoyarvík liggur eitt stórt øki, sum er klárt at byggja á. Bíðað verður bara eftir at býráðið ger av, hvat skal fara fram á økinum, og hvør sleppur framat.

Karl Heri Joensen, formaður í teknisku nevnd í býráðnum, sigur, at millum 6 og 8 fyritøkur hava søkt um at fáa eitt grundstykki á ídnaðarøkinum.

Bara fýra stykki eru eftir at berjast um, so allar fyritøkurnar fáa ikki tað, tær ætlaðu. Tvey stykki eru longu seld til fyritøkur, sum enn ikki hava tikið tey í nýstlu, meðan ein bygningur við bilasølu og verkstaði stendur uppi. Tað eru fyritøkurnar Elmar Zachariasen og Mallco, ið hava ognað sær stykki á ídnaðarøkinum, men enn er einki byggivirksemi farið í gongd hjá teimum.

Tað er tí eingin ivi um, at vinnulívið hevur stóran áhuga í hesum økinum, og at fyritøkur hava tørv á plássi at byggja út.


*Fleiri fyritøkur hava søkt býráðið um at byggja á hesum økinum, og tær kunnu nú vænta at fáa svar skjótt*

Fundur verður um hesi viðurskifti skjótt, og tær fyritøkur, ið hava sent býráðnum umsókn, kunnu tískil vænta sær svar rættiliga skjótt.

Kari Heri sigur, at býráðið fer at taka býarætlanina sum heild til viðgerðar, og tað skal eisini staðfesta meira nágreiniliga, hvat gerast skal á økinum.

# Tornið tikið niður


*Tornið er burtur. Svimjihøllin stendur fyri stórum umvælingum, og tí er tornið tikið niður*

**Tornið í svimjihøllini í Klaksvík er tikið niður. Svimjihøllin stendur fyri stórum umvælingum, og klaksvíkingar sleppa ikki at svimja aftur fyrr enn til várs**

SVIMJIHØLLIN
*Stefan í Skorini*

**KLAKSVÍK:** Arbeiðsmenn hjá byggifelagnum Kanjon hava tikið stóra tornið í svimjihøllini í Klaksvík niður. Tað er sostatt ein býarmynd í Klaksvík, sum nú er horvin.

Svimjihøllin hevur verið stongd síðan 16. juli í summar, og hon letur væntandi uppaftur einaferð í vár. Tað verður tó ikki greitt fyrr enn einaferð í desember mánaði, nær høllin letur uppaftur.

Høllin er í ringum standi, og tí var neyðugt við eini stórari umvæling. Høllin verður eisini partvís umbygd. Vippurnar, sum vóru í torninum, skulu eftir øllum at døma burtur, tí tær verða ikki nógv nýttar av teimum vitjandi. Ístaðin er ætlanin at gera eina stóra skreiðibreyt í sunnara endanum av høllini. Hetta er ikki roynt í Føroyum áður, og tí er spennandi, hvussu hetta fer at rigga.

Klaksvíkingar vóru annars teir fyrstu í Føroyum at fáa sær eina innilokaða svimjihøll, men nú er hon so gomul, at hon krevur umvælingar.

# Vestara bryggja steingjast fyri ferðslu

**Trongligt er á vestaru kai í Klaksvík. Tí skulu ørindaleysir førarar í framtíðini halda seg burtur haðani**

FERÐSLA
*Stefan í Skorini*


*Hetta økið av vestaru kai verður stongt fyri almennari ferðslu framyvir, um tekniska og havnarnevnd fáa sín vilja*

**KLAKSVÍK:** Tekniska nevnd hjá Klaksvíkar býráð hevur umrøtt ferðsluviðurskifti á vestaru kai. Fyritøkurnar á staðnum hava leingi havt trupulleikar við nógvari ferðslu, sum ikki hevur nøkur ørindi á økinum.

Sera trongligt er á bryggjuni, og nógv tung ferðsla er eisini har hvønn dag. Tí er tað til stóran ampa, tá fleiri óviðkomandi fólk leita sær oman á hetta økið.

Hetta skal steðgast. Tí hevur tekniska nevnd mælt til at seta avmarkingar, so at bara fólk við arbeiðsørindum sleppa at ferðast har framyvir. Hetta skal gerast við at seta skelti upp, sum siga frá, at her er bara arbeiðskoyring loyvd.

Karl Heri Joensen, formaður í teknisku nevnd, sigur, at hetta skal gerast í samráð við fyritøkurnar, sum halda til har, og at tær skulu vera við at taka avgerð um, hvar hesi skeltini skulu vera.

Nevndin hevði hugsað sær, at tað eina skelti var við omankoyringina beint norðanfyri Trol- og Snørisvirki. Hitt skuldi vera við virkið hjá Anthonius, so at óviðkomandi ferðsla ikki slapp at koyra norðanfyri frystivirkið. Tá hesi skelti eru sett upp, er tað ólógligt at koyra á hesum økinum, uttan tú hevur ávís ørindi. Løgreglan kann geva bót fyri slíka koying.

Býráðið skal taka støðu í hesum málinum á fundi í hesi vikuni, og tað verður helst sett í verk beinanvegin.

## Lønin liggur í buktini

**Óvist er, hvat úrslitið av samráðingunum millum Føroya Handverkarafelag og Handverksmeistarafelagið verður. Handverkararnir krevja størri lønarhækkan, enn meistararnir vilja lata**

SAMRÁÐINGAR
*Stefan í Skorini*

Nú á middegi hósdagin hava feløgini hjá handverkarum og handverksmeistarum verið við samráðingarborðið í 48 tímar. Tí kravdu semingsmenninir, John Rajani og Súni Schwarts Jacobsen, at okkurt úrslit skuldi spyrjast burturúr. Feløgini fingu eina freist til hósdagin á middegi at svara semingsmonnunum, so teir kundu staðfesta, um nøkur loysn kann finnast.

Handverksmeistararnir góðtóku eitt uppskot, ið varð lagt fyri partarnar á middegi mikudagin, men handverkararnir vrakaðu hetta semingsuppskotið.

Semingsmenninir hava ikki lagt nakað nýtt semingsuppskot fyri partarnar, men hava síðani arbeitt víðari fyri at vita, um nakað grundarlag er fyri at samráðast.

Sum vanligt er við sáttmálasamráðingar er tað lønin, sum liggur í buktini. Meistararnir vilja ikki lata eins stóra lønarhækkan, sum handverkararnir fegnir vilja hava. Um samráðingarnar slitnaðu hósdagin kann væntast, at arbeiðssteðgur verður settur í verk.



# Skilaleys viðgerð

**Tað líkist púra ongum, at tingmenn fara at viðgera ein almennan tænastumann á røðarapallinum, sum gjørt varð mikudagin, tá ávísur persónur varð lagdur undir korruptión, sigur landstýrismaðurin, sum varðar av málinum**

TINGVIÐGERÐ
*Edvard Joensen*


*Ein munnligur fyrispurningur frá Kristiani Magnussen, løgtingsmanni, endaði við, at løgtingsmenn av røðarapallinum fóru at viðgera ein almennan embætismann*

*Tilvildarlig savnsmynd úr Løginginum*

Tað er langt úti, at ávísur yvirlækni, sum arbeiðir við gransking í Føroyum, av tingsins røðarapalli verður lagdur undir korruptión og at vera ein fløskuhálsur í føroyskari gransking, sigur Sámal Petur í Grund, landstýrismaður. Hóast einki navn varð nevnt, var adressan av røðarapallinum ikki til at fara skeiv av.

Í samband við munnligan fyrispurning frá Kristiani Magnussen, løgtingsmanni, til Sámal Petur í Grund, landstýrismann, um hvussu gongur við lógaruppskotinum um ílegugransking, endaði tað við, at yvirlæknin, sum stendur fyri lógararbeiðinum, varð til viðgerðar.

Hóast einki navn varð nevnt, er tó eingin ivi um, at talan er um yvirlæknan á Deildini Fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Pál Weihe.

Maðurin varð av tingsins røðarapalli sagdur at vera ein fløskuhálsur í føroyskari gransking. Eisini varð havt frammi, at hann ikki er gegnigur til at gera slíkt arbeiði, tí hann sjálvur hevur samband við útlendsk felag, sum er áhugað í føroyskari ílegugransking (gengransking). Í hesum sambandi brúkti ein løgtingsmaður orðið korruptión.

## Púra misskilt

Sámal Petur í Grund, landstýrismaður við almanna- og heilsumálum, heldur,at tingmenn púra høvdu misskilt, hvat málið snúði seg um. Teir viðgjørdu ein embætismann, og tað er langt úti, sigur hann.

Talan var um, at Kristian Magnussen, løgtingsmaður, hevði spurt landstýrismannin um, hvussu tað gekk við lógaruppskotinum um ílegugransking í Føroyum. Og í hesum sambandi fleyt yvir hjá summum tingfólkum, sum fóru at viðgera mannin, sum stendur fyri lógararbeiðinum.

Tað er soleiðis, sigur Sámal Petur í Grund, at arbeitt hevur verið við lógaruppskoti um ílegugransking í Føroyum. Til at taka sær av tí fakliga hevur hann heitt á Pál Weihe, yvirlækna, sum hann metir hava betri førleika enn aðrir embætismenn undir Almanna- og Heilsumálastýrinum. Júst tí maðurin í sínum dagliga arbeiði í fleiri ár hevur fingist við gransking.

## Granskingarlóg

Tað, sum gerast skuldi, var eitt lógarverk, sum skal halda skil á, hvør skal sleppa at granska í føroyskum ílegum. Tað er nevniliga sera viðbrekið evni, og kann ikki latast hvørjum sum helst, sigur Sámal Petur í Grund.

Ætlanin er at gera ein stovn, sum skal geva loyvi til gransking og umsita tey loyvi, sum givin verða. Hetta er stórarbeiði at fara undir, tí ongastaðni er nakað tilfar at skriva av.

Pál Weihe, yvirlækni, hevur so verið líkasum primus motor í hesum, upplýsir Sámal Petur í Grund, landstýrismaður.

At sami yvirlækni hevur havt samband við útlendskan granskingarstovn, er so fallið summum løgtingslimum fyri bróstið, tí tey halda, at tað er hann, sum skal geva loyvini. Men tað er ikki rætt, sigur landstýrismaðurin, tí tað er jú tann stovnurin, sum tosað er um, ið skal geva hesi loyvini.

Eisini hevur verið fýst á, at tað gongur ov seint við at koma í gongd. Víst hevur verið á, at fleiri feløg og einstaklingar hava bíðað eftir svari fyri at sleppa at granska í Føroyum, men hava einki loyvi fingið.

Hetta leggja summi tingfólk út soleiðis, at tað er yvirlæknin, sum liggur í buktini, tí hann er áhugaður í, at »hansara« granskingarsamband uttanlands skal fáa loyvið.

–Tað er tað reina tvætl, sigur Sámal Petur í Grund, landstýrismaður. Grundin til, at einki loyvi er givið, er tann, at eg sum politiskur myndugleiki ikki vil geva loyvi, fyrr enn lógarverkið er komið upp á pláss. Júst fyri at sleppa undan slíkum tápuligum tosi, sum tað í tinginum mikudagin.

Um sjálvt lógararbeiðið sigur landstýrismaðurin, at ráuppskotið hevur verið til hoyringar, og eitt endaligt uppskot verður skrivað og lagt fyri tingið rættiliga skjótt.

Pál Weihe, yvirlækni, vil iki gera viðmerkingar til málið.

# Valið nærkast

**Nú løgtingsvalið nærkast, eru ymsu politisku flokkarnir farnir undir uppstillingarfundirnar. Suðurstreymoyar Javnaðarfelag hevði fyrsta fundin mikukvøldið**

UPPSTILLING
*Edvard Joensen*

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag hevði fyrsta uppstillingarfund til løgtingsvalið mikukvøldið. Nakað av fólki var á fundi, og ein bruttolisti varð gjørdur.

Sum vanligt plagar at vera, var fundurin kanska líka nógv ein uppsamlingarfundur sum ein uppstillingarfundur, sigur Elspa Olsen, formaður í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag. Roynt var at finna fram til fólk, sum vilja vera á vallistanum til løgtingsvalið.

Tað kunnu vera í minsta lagi 11 fólk á vallistanum í Suðurstreymoyar valdømi, og tað ætlar felagið at hava, sigur Elspa Olsen. Tað er heldur eingin trupulleiki at finna tey fólkini, sigur hon. Fleiri eru, sum hava gjørt vart við av sínum eintingum, at tey vilja sleppa á listan, meðan onnur eru, sum heitt verður á.

Elspa Olsen sigur, at á fundinum mikukvøldið varð støðið tikið í listanum frá seinasta vali og funnið fram til, um onkur av teimum, sum tá var uppstillaður, hevði hug at royna aftur.

Onkur er, sigur hon. Til dømis Katrin Dahl Jacobsen og Kristian Magnussen, løgtingsmenn, hava boðað frá, at tey stilla uppaftur. Eisini er møguleiki fyri, at onkur býrðáðslimur úr Havn hevur hug at standa á løgtingsvallistanum.

–Tað hevur annars ikki verið vanligt, sigur Elspa Olsen, formaður í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag.

Hinvegin sigur hon, at sum er, er ikki líkt til nakra óvæntaða uppstilling soleiðis at skilja, at kanska onkur kendur politikari aðrastaðni frá hevur hug at skifta flokk ella nakað sovorðið. Heldur ikki var líkt til á fyrsta fundinum, at nakar, sum fyrr hevur verið uppi í politikki, hevur hug at gera »come back«.

Nú verður so arbeitt víðari við tí fyribils listanum, sum gjørdur varð. Annar uppstillingarfundur verður einaferð í november, sigur Eslpa Olsen, og er ætlanin hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag at vera liðugt við endaligu uppstillingina í hesum árinum.


*Uppstillingarfundirnir til løgtingsvalið eru byrjaðir. Suðurstreymoyar Javnaðarfelag hevði fyrsta fundin mikukvøldið*

*Savnsmynd frá landsfundi hjá Javnaðarflokkinum*